# Fastir mans skera á háls

**Í Havn er skipanin soleiðis gjørd, at tað eru fastir mans, sum skera á háls á sandinum. Tað sleppur tí ikki hvør Hanus og Janus framat, men bert vandir menn**

Leo Poulsen



*Í Havn eru fastir mans á sandinum at skera á háls*

Mynd: Jens Kristian Vang

Tá grind verður hildin til í Havn, kemur valla fyri, at hvalir verða skornir skeivt á háls. Tað eru nevniliga bert nakrir úrvaldir mans, sum sleppa at skera á háls.

– Hetta er ein skipan, ið hevur nøkur ár á baki nú. Vit sóu, at tað uppstóð meiri ella minni kaos á sandinum, tá fólk bara velti oman í Sandágerð, og tí var hendan skipanin, har bert vandir menn sleppa oman at skera á háls, sett í verk, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Tað er Brandstøðin, ið umsitur skipanina og tá grindaboð eru og støða er tikin til, at hon verður rikin á Havnina, fer ein sms-skipan í gongd, har menn verða tilkallaðir.

Tað er so upp til formannin á sandinum at gera av, nær grindin verður hildin til.

– Formaðurin á sandinum hevur samskifti við formenninar á bátunum og gevur boð um, nær klárt er at halda grindini til. Eru ov fáir mans á sandinum, verða boð givin til bátarnar um at steðga við at halda grindini til, inntil nóg nógvir mans eru klárir at skera á háls, sigur Heðin Mortensen.

Eisini verður sandurin sperraður av, og eingi onnur fólk, enn hesir útvaldu menninir sleppa av vera niðri við sjóvarmálan, meðan drápið fer fram.

– Fólk standa so uppi á bakkanum og hyggja at, og ikki fyrr enn drápið er liðugt, sleppa tey oman á sandin, sigur Heðin Mortensen.

## Fast fólk

So skjótt sum drápið er liðugt, verður farið undir at sleipa hvalirnar heim á Vónakeiina, har teir so fyrst verða opnaðir. Tá so alt er komi til hóldar, verður farið undir at merkja.

– Tað eru eisini her fastir mans, ið nummerera og merkja hvalirnar. Tá tað arbeiðið er liðugt, verða tølini borin heim á býráðsskrivstovuna, og har síggja vit so talið av hvalum og hvussu nógv skinn hvør hvalur er, eins og teir hyggja eftir, um tað er hann – ella honfiskur, sigur Heðin Mortensen.

Síðani verða skinnini tald saman og talið á drápspartum dividerað upp í skinnatalið og soleiðis verður so býtt millum grindafólkið.

Hesaferð vóru drápspartarnir oman fyri 1870. Bara á sandinum vóru omanfyri 900 uppskrivað, og so koma so bátarnir og fólkið í bátunum aftrat, sigur Heðin Mortensen.

Tórshavnar kommuna hevur eina púra greiða reglugerð hvussu farast skal fram, tá grind leggur beinini í Havn.

– Vit halda fólkið uppdaterað alla tíðina, og kemur nøkur broyting í, verður kallað inn til fundar við grindaformenn, drápsmenn á sandinum, brandmenn og øll tey, ið vara av grindadrápi. Tey verða so kunnað um broytingarnar, sigur Heðin Mortensen.

So vítt vit hava skilt, er tað bert í Havn, at hendan skipanin verður nýtt, og sambært borgarstjóranum virkar skipanin avbera væl.

– Tað er ein sonn frægd at verða við til eitt grindadráp í Havn, tí tað gongur so fyrimyndarliga fyri seg, sigur Heðin Mortensen.

*leo@sosialurin.fo*

# Týskarar ávara móti grind

**Ein týskur felagsskapur hevur í kvittanum at vitja í Føroyum, ikki fyri at mótmæla grindadrápi, men fyri at ávara ímóti at eta heilsuskaðiligt tvøst og spik**

Leo Poulsen

Týsku felagsskapirnir, Wal und Delfinschutz Forum (WDSF), og ProWal hava í hyggju at koma til Føroya at halda fyrilestur um, hvussu skaðiligt tvøst og spik er at eta.

Í einum longum brævi til Føroya løgmann, Kaj Leo Johannesen, verður greitt frá, hvussu illa dálkað grind er, og hvussu skaðilig hon tí er at eta hjá fólki.

Í brævinum verður eisini róð upp undir, at føryingar heldur enn at drepa grind áttu at skapt eina tradition fyri »whale-watching«. Greitt verður frá, hvussu gevandi ein slík vinna hevði verið fyri føroyingar og pástaðið verður, at aðrastaðni forvinna ferðamannaídnaðir í milliardum av krónum burtur úr hvalaskoðan.

Í brævinum verður fleiri ferðir lagdur dentur á, at ætlanin er ikki at mótmæla føroyska grindadrápinum, men heldur at læra føroyingar, at tað er ósunt at eta grind.

Hesir felagsskapir krevja eisini, at løgmaður kemur við haldgóðum prógvum fyri, at drápið nú er meira humant, enn tað hevur verið. Týskararnir siga seg vera skelkaðar av drápi, sum teir upplivdu fyri tíggju árum síðani, og teir góðtaka ikki orðini hjá løgmanni um, at drápshátturin í dag er broyttur.

Eftir øllum at døma hevur løgmaður ikki hirt at svara hesum týsku felagsskapum aftur, tí í maili kæra teir seg um, at teir hvørki hava frætt orð ella eið.

Í sama maili verða miðlarnir bodnir við á tíðindafund, sum verður hildin á týskum onkunstaðni í Havn 4. august.

## Dialog við løgmann

Felagsskapurin WDSF sigur seg hava stóra ávirkan á hvalaveiðitjóðir, og eitt av úrslitunum hjá felagsskapinum er, at japanesarar ikki longur borðreiða við hvalatvøsti á skúlunum – og tað má sigast vera ikki hissini avrik. Spurningurin er so bara, hvussu nógv hald er í teimum tíðindunum.

Felagsskapurin sigur seg eisini vera í einum samstarvi við Pál Weihe um kanningar, hvørt grindatvøst elvr til Parkinson sjúkuna.

Nevnt verður, at grindahvalurin er illa dálkaður av kyksilvuriki, PBC og øðrum giftevnum, men kortini verða Føroyar ikki lagdar undir at hava dálkað havið við hesum giftevnum.

Hinvegin vísir WDSF á, at Føroyar eru so væl fyri figgjarliga, at eingin orsøk er til at veiða og drepa grind. Sagt verður, at tað er skilligt við so langari tradition fyri grindaveiði, men tað er fyri okkara egnu skuld, at vit skulu gevast við at eta grind.

Út frá brævinum tykist, sum hava føroyingar ongantíð hoyrt um kyksilvur ella PBC, og tí halda hesir menninir, at tað er neyðugt hjá teimum at koma til Føroyar at útbúgva okkum óvitandi føroyingar um, hvussu vandamikið tað er at eta tvøst og spik.

Eisini vilja teir sleppa í ein persónligan dialog við løgmann, so teir kunnu sannføra hann um, at forboð má setast fyri at drepa grind – ikki tí tað er andstyggiligt, men fyri okkara egna besta.

Eisini heita teir á løgmann um at boða teimum frá næstu ferð ein grind verður hildin til, so teir við egnum eygum kunnu síggja, hvussu eitt grindadráp fer fram í dag.

*leo@sosialurin.fo*